# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

### Minningarorð um vinmannin

## Andrias Samuelsen



Mikudagurin 13. august 2008 var ein sorgardagur fyri okkum tríggjar. Hendan dagin andaðist Andrias Christian Samuelsen í Havn, bert 61 ára gamal. Fyri okkum tríggjar var hann bara Samuelsen. Vit høvdu mist ein góðan og trúfastan vinmann.

Vit fýra hittust á Grannskoðaravirkinum hjá Jógvan Sundstein síðst í 80-unum og fyrst í 90-unum, har vit starvaðust. Sjálvt um Andrias var eldri enn vit tríggir, so rann skjótt saman okkara millum við góðum vinskapi og samanhaldi. Aldursmunurin í hesum høpi hevði ongan týdning og kom ongantíð til sjóndar, tey fylgjandi mongu árini, ið okkara vinskapur vardi. Hansara umhugsni og trúfesti móti okkum helt á líka til tað síðsta.

Tá ið Andrias kom heimaftur úr Danmark og byrjaði á Grannskoðaravirkinum aftur, høvdu vit gjørt okkum eina mynd av manninum. Teir eldru arbeiðsfelagarnir kendu hann frá fyrr av og høvdu bert rósandi orð um hendan dugnaliga mannin. Vit fingu skjótt at sanna at so var. Ein sera arbeiðssamur maður, við hollari vitan um roknskap, grannskoðan og fiskivinnu, bæði í Føroyum og uttanlands. Hann var ógvuliga hjálpsamur og var altíð tilreiðar at rætta eina hjálpandi hond. Ein beit eisini merki í hansara glaða og positiva lyndi, og sást hetta serliga, tá ið tíðarfreistir skuldu haldast, og fólk vóru strongd og troytt. Tá kom hann við eini positivari og ofta skemtiligari viðmerking.

Fyrst í 90-unum skiltust okkara vegir, tá ið vit tríggir fóru í onnur størv. Andrias varð tó verandi á Grannskoðaravirkinum, eitt starv hann hevði, inntil hann andaðist. Hóast tað, at vit ikki arbeiddu saman longur, helt vinskapur okkara, og vit avgjørdu at halda sambandið við hvønn annan. Tað vísti seg nevniliga, at vit trivust væl saman, og tí varð avgjørt, at vit skuldu hittast tvær ferðir um árið, og hevur hetta verið soleiðis hesi síðstu 14-15 árini. Vit hava vitjað flest allar matstovur í miðstaðarøkinum, har vit hava hugleitt um farnar dagar, politikk, átrúnað, samfelagsmál og mangt, mangt annað. Áftaná eina góða máltíð, plagdu vit at fara heim til ein av okkum til ein góðan kaffimunn og ofta gjørdist tað seint, áðrenn vit skiltust. Okkum kemur til hugs, allar tær góðu og hugnaligu løturnar, vit hava sitið í stovuni hjá Andriasi og Aju. Tað varð altíð skemtað nógv, og tíanverri gingu hesar løtur alt ov skjótt. Sum frá leið gjørdist hetta eitt av hæddarpunktunum í árinum hjá okkum fýra, og tí gleddu vit okkum hvørja ferð til at hittast. Nú Andrias ikki longur er okkara millum, hava vit tó avgjørt at halda fram við hesi siðvenju, tað hevði Andrias óivað gleðst um. Tað kennist tó ógvuliga løgið, at tann eini stólurin nú stendur tómur.

Nú vit aftur hittast, sita vit á eini matstovu í Runavík og skriva minningarorð um okkara góða vinmann. Vit hava mangan spurt okkum sjálvar, hvussu tað bar til, at tað fall so væl í lag okkara millum, og at vit hildu so væl saman hesi árini. Kemiin var bara har.

Góði Andrias. Vit sakna teg ómetaliga nógv. Takk fyri allar tær góðu og hugnaligu løtur vit høvdu saman. Okkara bøn er, at tú Aja, Inga og Elisabeth og mugu finna troyst hjá Honum, sum er Gud alra troystar. Æra verður minnið um vinmannin, Andrias.

**Emil, Petur Juul og Poli**

†

### Andlát og jarðarferðir

**Lítli Jákup**, sonur Joan og Jaspur Tausen, andaðist 15. november á Hjørring sjúkrahúsi. Tey, ið ynskja at minnast Jákup, kunnu lata eina peningagávu til Nebo á Toftum, konta í Føroya Banka.

†

**Elinborg Trónd Johansen**
Tórshavn

andaðist hósdagin 20. nov., 80 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Vegna tey avvarðandi*
**Finnur Johansen**

Sosialurin -har tað hendir

### Minningarorð um

## Andrias Chr. Samuelsen



Góði Lítli!

Eg sakni teg so sáran. Í dag hevði tú fylt 62 ár. Tað var so stutt ímillum okkum bæði; vit vóru yngst av 4 systkjum. Vuksu upp úti í Perskonugøtu, har mamma og pápi festu búgv, beint innan fyri bøgarðarnar. Tá var langt heim í Havnina. Pápi okkara, Mikkjal Samuelsen, nevndur Mikkjal í Horni, var sonur bakaran í Horni, Andrias, sum tú var uppkallaður eftir, og mamma, Inga f. Simonsen, var ættað av Viðareiði.

Barnaárini vóru ótrúliga góð. Vit høvdu neyt, seyð, gæs, hønur, hund og kettu. Rossið Floru minnist eg eisini. Tá ið vit vóru í Havnardali í torvi, tá var gott at seta seg í hestavognin.

Kavakvøldini plagdu vit at skreiða heilt úti frá okkum og oman Kinabrekkuna, heim á Bøkkin (við Vesturkirkjuna), framvið Bryggjarínum – líka heim í Konradsbrekkuna. Bilar vóru fáir, og møtti tú einum í Kinabrekkuni, har smalast var, so var bara at venda útav.

Vit gingu bæði í Kommunuskúlanum á Vaglinum – í 1956 var farið niðan í nýggja gula Kommunuskúlan. Liðugur við Mellem- og Realskúlan fór tú í læru í Sjóvunnubankanum, eg fór í læru í Føroya Banka. Vit gingu í sunnudagsskúla í Ebenezer og í Bíbliuflokkinum fyri ung, har vit bæði komu til persónliga trúgv á Harran Jesus á ungum árum.

Í 1967 vildi tú royna nakað nýtt. Fór til Keypmannahavnar at arbeiða í banka. Tú var óførur at skriva heim og har ímillum var ein sangur, sum tú hevði yrkt, og sum bleiv mær so kærur. Seinri fór tú í starv á Grannskoðaravirkinum hjá Jógvani Sundstein, seinri Inpact. Har treivst tú sera væl; tú elskaði títt arbeiði, og nú tú var vorðin so sjúkur, ynskti tú mangan at kunna farið aftur til arbeiðis.

Tú giftist Aju á Bergi úr Klaksvík í 1971 og tit fingu døturnar Ingu í 1972 og Elisabeth í 1976. Tú elskaði tína familju og ikki minst abbasynirnar, og tá eg tosaði við teg, spurdi tú altíð:"Hvat gera teir báðir, Mikkjal og Kári".

Tú var ein góður bróðir at hava, friðarligur, lítillátin, nærlagdur, dugnaligur og sera røkin í øllum, skemtingarsamur og stuttligur at vera saman við. Tú las nógv og fylgdi væl við tí, ið hendi í samfelagnum. Var sera tolin, og á tíni drúgvu sjúkralegu, hóast so illa sjúkur, gramdi tú teg ongantíð. Alt var gott.

Góðu Aja, Elisabeth og Inga, Heri, Andrias, Jónas og Elias. Tit hava mist nógv. Má Harrin signa og varðveita tykkum. Tit vóru so sera væl um hann líka til tað síðsta. Gott at eiga tað lyftið, at vit skulu møtast aftur í Himli ein dag.

Friður veri við minninum um beiggja mín Lítla.

**Jóhanna Maria**